**Nr. 91/2014**

**Kári P. Højgaard**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um Eysturoyartunnilin, settur Jørgen Niclasen, landsstýris-manni í fíggjarmálum (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Kann landstýrismaðurin upplýsa, hvørjar atknýttar verkætlanir skulu gerast til Eysturoyartunnilin og kostnaðin av hesum?

2. Hvat boð hevur Fíggjarmálaráðið til rentukostnað av komandi undirsjóvartunlunum?

**Viðmerkingar**
Semjan, sum bleiv gjørd millum teir sjey politisku flokkarnar á Løgtingi, staðfesti, at ætlanin at gera Eysturoyartunnilin sum privata íløgu steðgaði, og at hendan sama verkætlanin í staðin bleiv framd í einum 100% almennum partafelagi.

Talan er nú um júst sama prosjekt við Eysturoyartunlinum, tó er linjuføringin løgd vestari á.

Landsverk upplýsti í 2013, at atknýttar verkætlanir til Eysturoyartunnilin komu at kosta út ímóti 600 milliónum.

Nú arbeiðið við at gera undirsjóvartunlar millum Eysturoy, Streymoy og Sandoy eftir ætlan byrjar komandi ár, er neyðugt at staðfesta, um henda meting framhaldandi stendur við.

Eisini er viðkomandi at meta um rentustøðið, nú partapeningur og fortreytirnar annars eru greiðar, ið almenna partafelagið hevur at virka eftir.

**Á Løgtingi, 5. mai 2015**

Kári P. Højgaard